

*Aprilia RSV1000R er ein koyriuppliving í serklassa, sum setur krøv reaktiónsevnini hjá føraranum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Aprilia RSV1000R

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,0 litur – 4-takt – 143,8 hk v/9.980 umdr/min |
| 0-100 km/t: | 3,2 sek (á einum strekki upp á 46 metrar) |
| 400 metrar: | 10,6 sek (tá er ferðin 217,8 km/t) |
| Toppferð: | 289,1 km/t |
| Bensinnýtsla: | 10,8 km/l |
| Støðd og vekt: | |
| Longd | 203,5 cm |
| Breidd | 73,0 cm |
| Hædd | 114,5 cm |
| Aksilfrástøða | 141,8 cm |
| Eginvekt | 189 kg |
| Bensintangin: | 18 litrar (inkl. 4 litur eykatanga) Koyrir 194 kilometrar upp á ein tanga |
| Prísur: | kr. 209.998,- |
| Søluumboð: | AD-Import R.C.Effersøesgøta 21 FO-100 Tórshavn Tel. 309999 www.ad-import.fo |

Aprilia RSV 1000R:

# Koyriuppliving í serklassa

**AD-Import hevur fingið eina Aprilia RSV1000R motorsúkklu heim. Súkklan er nakað av tí besta, sum evropeiski motorsúkkluídnaðurin hevur skapt higartil.**

MOTORSÚKKLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Aprilia RSV1000R er ein koyriuppliving í serklassa, sum setur krøv reaktiónsevnini hjá føraranum. Súkklan er so stór og kvik, at tað er skjótt at ferðin verður alt ov stór, uttan at førarin varnast tað.

Motorurin er ein 1,0 litur 4-takts vatnkøldur við tveimum sylindarum og dupultum yvirliggjandi knastakslum, 138 hk og 6 gir.

Hóast Aprilia RSV er ein stór súkkla sum vigar 189 kg, virkar hon sera løtt at koyra. Tað at tyngdipunktið er frammaliga og ovarliga gevur eina ómetaliga góða javnvág, sum ger at súkklan hevur sportsligar koyrieginleikar í toppklassa, eisini í svingum.

Størsta minus við Aprilia RSV er, at hon er so góð at koyra á, at um man veruliga vil njóta súkkluna, er skjótt, at koyrikortið er í vanda.






Auto gloss, Fuglafjørður:

# Spesialistar í upprætting og lakkering

**Á Innandalsvegi í Fuglafirði er fyritøkan Auto gloss, sum hevur spesialiserað seg í upprætting og lakkering. Umframt bilar lakkera teir eisini t.d. hurðar, vindeygu o.l.**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er 25 ára gamli fuglfirðingurin og bilmekanikarin Sonni á Horni, sum eigur og rekur fyritøkuna.

Auto gloss hevur spesialiserað seg í upprætting og lakkering av bilum. Teir eru væl útgjørdir við t.d. upprættarabeinki, sproytukabinu og nútímans sveisiamboðum.

Teir hava eisini tey neyðugu amboðini til plastikkumvælingar av t.d. kúfangarum og øðrum plastikklutum.

Umframt bilar lakkera teir eisini vindeygu, hurðar o.l. Bjarnastein-gittarkassarnir verða eisini lakkeraðir hjá Auto gloss.

Trý til fýra starvsfólk arbeiða hjá Auto gloss, sum hevur tel. 444400 og 221487 og heldur til á Innandalsvegi 36 í Fuglafirði.





